


*Føroyingar brúka nógv impregnerað træ til húsabygging. Tað er bíligari, men átti at verði forbjóðað við lóg, sigur Jákup Pauli Johannesen, arkitektur, sum staðfestir, at hóast fakliga tilvitan liggur føroysk bygging í lógarligum óskiliã*

# Føroyar mangla byggilóggávu

**Vit eru eftirbátar, tá tað snýr seg um krøv til hitabjálving. Hetta sigur føroyskur arkitektur. Føroyar hava ikki – eins og grannalondini - eina landsbyggilóg við krøvum um umhvørvisvinarliga bygging, og tað hevur avleiðingar**

UMHVØRVI
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Høgni Thomsen*

Danir hava eina yvirskipaða byggilóggávu sum krøvum um innrætting, ljóðviðurskiftum, hitabjálving, fuktverju og annað. Slíka lóg hava vit ikki í Føroyum. Einasti partur av hesum lógarverki, sum er á føroyskum, er ein kunngerð um brunaverju og brunatrygd. Hetta merkir at føroyskir byggiharrar kunnu vísa til donsku lógina, men hava eingi krøv.

- Mær vitandi, varð arbeitt við at gera føroyska lóggávu á økinum seinast í 80unum, men hetta stegðaði upp av kreppuni, og síðani er millum lítið og einki hent, greiðir Jákup Pauli Johannesen, arkitektur í Fuglø Arkitektum frá.

- Kommununurnar hava, hvør í sínum lagi, fyri at hava okkurt at umsita eftir, tikið nakrar høvuðsásetingar um hesi viðurskifti við í byggisamtyktirnar, tá tær blivu gjørdar av fyrstum tíð í 60- og 70-unum.

- Tá tað snýr seg um krøvini til hitabjálving halta flestu byggisamtyktir langt aftaná. Onkrar ásetingarnar eru á hædd við donsku byggilógina frá 1972 – sum jú er áðrenn oljukreppuna, tá hetta við oljunýtslu til upphiting veruliga kom á dagsskrá.

Í Danmark er byggilóggávan javnan dagførd, meðan vit í Føroyum ikki enn hava fingið í lag at gera eina yvirskipaðað byggilóggávu. Hetta er, milt sagt, sera óheppi, heldur Jákup Pauli Johannesen.

## Føroyar eftirbátur

Síðani dagføringina av danska Bygningsreglimentinum í 1972 eru umframt regluligar rættingar nýggjar útgávur gjørdar í 1982, 1995 og nú í 2008.

Jákup Pauli Johannesen, arkitektur, sigur, at hann ikki hevur nærlisið nýggjastu útgávuna enn, men longu í 1982 hevði danska lógin krøv um hitabjálving, sum tók støði í einum spírandi umhvørvisfyriliti. Í Føroyum er eingi slík yvirskipaði krøv.

- Flestu føroysku byggiráðgevarnir hava danskar útbúgvingar og taka tí náttúrliga støði í donskum byggisamleika og lógarverki, men saknurin av føroyskari lóggávu á økinum er eyðsýndur, sigur hann.

- Hetta er sjálvandi ikki nøktandi, tí initiativið til meira umhvørvisvinarliga bygging má koma frá myndugleikunum, sigur Jákup Pauli Johannesen.

Hóast føroysku timburhúsini hava kraftiga timburgrind, sum kann rúma tjúkkari bjálving, er framvegis langur vegur til at vanlig føroysk hús kunnu metast at vera lágorkuhús. Føroysk byggisiðvenja viðvíkjandi hitabjálving er framvegis eftirbátur, um vit samanbera við lógarfestu krøvini í londunum rundan um okkum.

- Um vit skera yvir ein kamb, so hevði eg mett at hitabjálvingin av nýggjum føroyskum húsum man liggja um eini 60-80% av tí eini donsku hús eru bjálvað til, sigur Jákup Pauli Johannesen.

## Samlaður umhvørvisroknskapur

Tað er ikki bara orkunýtslan eftir at húsið er bygt, sum ávirkar umhvørvið. Eisini sjálv byggingin krevur orku, og orka skal eisini til at niðurbróta tilfarið, tá húsið skal takast niður ella umbyggjast. Harumframt er nógv av tilfarinum alt annað enn umhvørvisvinarligt.

Í Føroyum verður nógv timbur nýtt í húsabygging, og so gott sum alt træ til uttandura brúk er impregnerað. Evnini, ið nýtt verða, eru, í flestu førum, tað reina eitur.

- Hóast tað finnast aðrir mátar at gera timbrið haldbart, so verður, so at siga, bert impregnerað træ nýtt. Tað er bíligari, men átti í roynd og veru verði forbjóðað við lóg, sigur Jákup Pauli Johannesen, sum enn einaferð staðfestir, at hóast fakliga tilvitan liggur føroysk bygging í lógarligum óskili.

- Tað sigst, at við lóg skal land byggjast, men líkaleiðis kundi veri sagt, av við byggilóg skal bygging byggjast, sigur hann.

## Lóg fleiri ferðir eftirspurd

Spurdur hví vinnan finnur seg í slíkum lógloysi, sigur Jákup Pauli Johannesen, at bæði kommunur, byggiharrar, byggiráðgevarar og arbeiðsgevarar hava eftirspurt lógini, men enn er einki hent.

- Vit hava øll áhuga í at hava greiðar reglur. Kommunur og byggiharrar hava brúk fyri einari lóg at umsita eftir, og vit byggiráðgevar hava brúk fyri at hava reglur at ráðgeva eftir. Vit eftirspyrja øll lógini.

Jákup Pauli Johannesen heldur, at Landsverk skuldi fingið til uppgávu – sjálvandi við tilhoyrandi miðlum - at fyrireika føroysku lóggávuna og syrgt fyri at hon var regluliga dagførd.

- Tað er eingin grund til at uppfinna djúpa tallerkin umaftur. Grannalond okkara hava greiðar reglur, og Landsverk situr inni við stórum serkunnleika, og harumframt hava vit góðar serfrøðingar á umhvørvisøkinum. Tí er tað ikki ein spurningur um hetta letur seg gera. Tað snýr seg um politiskan vilja, sigur Jákup Pauli Johannesen at enda.